

*Kjell Nupen sýnir nú fram í Listaskálanum*
*Mynd: D.Olsen*

# Kjell Nupen í Listaskálanum

**Í dag letur upp stór framsýning við kenda norska myndlistamanninum Kjell Nupen**

LISTASTEVNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Kjell Nupen gjørdist á ungum árum kendur sum listamálari og er í dag millum kendastu og mest virdu norsku listafólkini.

Í dag klokkan 16 letur upp stór myndaframsýning við málningum og grafikki hjá Kjell Nupen. Hetta er í samband við Listastevnuna 2005.

Meira um Kjell Nupen í blaðnum í morgin.



# Gøran Persson á vitjan í Føroyum

**Tann 17. august kemur svenski forsætisráðharrin Gøran Persson á vitjan í Føroyum. Føroysk vinnulívsfólk fara at bjóða Persson at síggja føroyska fiskaframleiðslu og at kunna seg um útflutningin**

VITJAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Svøríki og Føroyar hava nógv handilssamstarv. Vit keypa fyri eini 300 mio. krónur úr Svøríki og vit útflyta fyri eini 60 mio. krónur árilga í fiskavørum. S/PF Baldur, Tavan, Kósin og Norfra samstarva um útflutning til Svøríkis og ein samstarvfelagi er kenda felagið ABBA Seafood.

Tá nevndu útflytarar frættu, at Gøran Persson kom til Føroya, settu tey seg í samband við Løgmansskrivstovuna og spurdu, hvørt tað var gjørligt, at Gøran Persson kom á vitjan í Klaksvík, fyri at kunna seg um føroyskan fiskaútflutning og eisini tann týdning, tað hevur, at ein forsætisráðharri fyri eitt keyparaland vitjat framleiðarar. Hetta varð játtað og skráin fyri vitjanina í Klaksvík er henda:

17 August; Gøran Persson til Vágar. Hann og fylgi fara til Klaksvikar við Silju. Kl 18.00 verður hann mottikin uttanfyri KÓSINA av Jóhannu á Bergi, sølustjóri hjá KOSIN SEAFOOD. Johan Mortensen, BALDUR, Jógvan Høj, Norðfra og Ingvar Joensen frá Tavuni.

Inni á Kósini fer Jóhanna á Bergi at hava eina framløgu um føroyskar fiskivinnu og vinnulív yvirhøvur.

Kl 19.20 verða Løgmaður og Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, vertar við ein døgurða í Skálanum fyri umleið 80 gestum. Borðrreitt verður við føroyskum fiski og føroyskum øli frá Restorffs og Føroya Bjór.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo



## Check-in fólk

Søkt verður eftir fólki til avgreiðsluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.

Starvið fevnir um check-in, sum er innskriving av ferðafólki. Hetta er eitt parttíðarstarv við skiftandi vaktum og arbeiðstíðum. Roknað verður við, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt. Innskrivingin verður gjørd við teldu.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum og prógvum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august 2005. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Egini Simonsen á tlf. 341022, 341050 ella e-mail: egin@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til: Atlantic Airways, Vága Floghavn, 380 Sørvágur.

ATLANTIC AIRWAYS
www.flyfaroe.com
www.sansir.fo